## DAGSINS MEINING

### Eitt virkið og gott samfelag

Ikki kann sigast annað um Føroyar og føroyingar, at hetta er eitt sera virkið samfelag og eitt sera virkið fólk. Tað fer ikki dagur, at tað verður skipað fyri tiltøkum av alskyns slag, í bygd og bý. Hóast vit eru fá og smá, so er tað ikki júst hetta, sum sermerkir okkum. Tvørturímóti boða tey mongu og fjølbroyttu tiltøkini kring alt landið frá, at her býr eitt virkið og livandi fólk, eitt fólk, sum hevur bjartskygni og áhuga í skjøldri. Eitt gott og stórt fólk.

Hví júst nema við henda spurningin í hesum døgum kundi verið spurt, tí tað nógva virksemi kring landið alt er nærum hvønndagshending. Einki sermerkt er tí við júst nú at reksa upp nógva virksemi, sum er alt árið. Rætt er tað, men lat okkum kortini tríva eitt sindur í hesar hvønndagshendingar ella afturvendandi hendingar, og spyrja okkum sjálvi, hvønn týdning tær hava ella eiga at hava.

Føroyar eru ikki størri enn ein lítil býur ella bygd í øðrum landi, hvat fólkatali viðvíkur, og tí skuldi ein trúð, at her var kanska ikki so nógv at fara til, ikki so nógv at tríva í. Hetta er bara ikki so. Hóast skjótt er at fara um landið alt, so tykist tað kortini sum, at hvørt búpláss hevur sín samleika og síni sermerki. Hevur sítt egna virkna lív. Hvør bygd hevur síni mongu ítróttarfeløg, síni mongu tónleika- og -listafeløg og annars áhugafeløg av alskyns slag. Bløðini og útvarpið boða hvønn dag frá hendingum og tiltøkum av øllum hugsandi slag, so kallendarin hjá mongum av okkum er fullur. Hvør skuldi trúð tí, nú sjónvarpsøldin av álvara ger um seg og har til ber at síggja hundraðtals filmar og sendingar als samdøgrið. Heldur ikki hesin avbjóðarin hevur megnað at taka egið virkisfýsni frá fólki, sum framhaldandi íðka og dyrka síni mongu og fjølbroyttu áhugamál. Og gott er tað.

Taka vit hesar dagarnar og teir komandi, so er skráin fjølbroytt. Hondbóltur og flogbóltur fyri bert at nevna tvær ítróttargreinar. Samfelagsmøti og kristiligar fundarrøðir. Dansiskeið og samskiftisskeið. Sjónleikur og listaframsýningar. Vinnudagur og ráðstevnur, eitt nú um almannaverkini í Norðurlondum, um sálarsjúku, um skeljadjór, um sjúkrarøkt, um teldutøkni, um olju, um skúla, "you name it". Og so teir mongu gestirnir, sum koma henda vegin at halda fyrilestrar og luttaka í skeiðum ol.

Jú Føroyar eru eitt gott og livandi land at búgva í. Tí er tað hugstoytt og stórt spell, at okkara politiska veðurlag, við sínum mongu myrku skíggjum, so oftani fær mjørkalagt henda positiva veruleika og oftani fær fólk, sum annars kenna seg sum góðar starvsfelagar, vinir, grannar og ættfrændir at venda sær móti hvør øðrum. Vit búgva í einum samfelag, har fólk kunnu hava ymisk og fjølbroytt sjónarmið. Tað er m.a. við tí veruleika, at vit eisini eiga at gleðast um alt hetta nógva virksemi og skapanarhug, tí tað ber boð um eitt livandi samfelag, eitt livandi fólk. Latið tí ikki ósemjuna og ónøgdina fáa fastatøkur í fólkinum. Latið okkum brúka skapanarevnini og hugflogið og tann positiva og virkna gerandisdagin og næstrakærleikan til at byggja brýr millum ósemju og ónøgd og ymiskar áskoðanir. Tí - tað skal vera pláss fyri okkum øllum á hesum klettum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Orsøkin er neyvan annað enn politiskur impotensur
## - manglandi yvirtøka og tøkni er tóm undanførsla

**Hans Pauli Strøm**
*fyrrv. løgtingsmaður*



Í bløðunum í gjár vísti eg á, at landsstýrismaðurin í lógarmálum sjálvur sendi stóra persónsdataskrá av landinum til danskan stovn at umsita undir donskum myndugleika - og at hon framvegis nú á fjórða ári verður umsitin ólógliga.

Í samrøðu í Sosialinum roynir landsstýrismaðurin at burturforklára henda sjálvskapta trupulleikan.

Og í aðrari umrøðu av málinum sær tað út, sum um danskur stovnur hevur skylduna fyri ólógligu umsitingini.

Hetta er burturvið. Men lat okkum so fyrst taka sjóforkláringin hjá landsstýrismanninum, til at tinglýsingin ikki er tikin aftur til Føroya, har hann sigur: "Tað er bara av tøkniligum orsøkum, at tað ikki er hent enn, og tí at málsøkið ikki er yvirtikið fult og heilt."

Hetta seinna fyrst er beinleiðis ósannindi. Tinglýsingin er føroyskt málsøki, og hevur altíð verið tað, líka síðan tinglýsingin byrjaði í 1962. At landsstýrið hesi árini hevur latið dómaraskrivstovuna umsita tinglýsingina hevur ONKI við manglandi yvirtøku at gera.

Haldi eisini at tað er langt úti, at landsstýrismaðurin skal geva tøkniligu stovnunum í Føroyum skylduna - at tað er av manglandi tøkniligum førleika í Føroyum, at tinglýsingin á fjórða árið liggur á danskari høvuðsteldu hjá partafelagnum CSC-Danmark A/S. Tá rættarnevndin umrøddi málið tíðliga á vári 2000, vóru umboð fyri tøkniligar og aðrar relevantar stovnar innkallað (Matrikulstovan, Elektron, Føroya Datasavn og fleiri), og var tað ein greið niðurstøða, at tað var als ongin tøkniligur trupulleiki og onki tøkniligt stórmál at gera eina føroyska telduskipan til tinglýsingina. Tá landsstýrismaðurin kortini vildi hava hana til Danmarkar, so at danir ókeypis og skjótt kundu gera sjálva umleggingina til EDV, so boygdi rættarnevndin seg fyri hesum, tí at so lovaði landsstýrismaðurin at syrgja fyri at ein føroysk telduskipan sum skjótast skuldi gerast, og tinglýsingin tí kunna takast heimaftur so at siga beinanvegin.

At onki er hent nú tað gongur á fjórða ári er fyri mær óskilligt, um tað ikki heilt einfalt er tekin um syndarligan politiskan impotens, tá tað snýr seg um praktiskan politikk heldur enn skról.

Tað er ikki Føroya rættur sum er skurkurin í málinum. Tað er ikki rætt, sum blaðgreinin sigur, at "tað er rætturin sum hevur evstu ábyrgdina" av at lógin ikki verður hildin. Hetta er 100% føroyskt málsøki. Tann sum hevur ovastu politisku ábyrgdina er landsstýrismaðurin. Verður málið ikki umsitið eftir lógini, er tað í síðsta enda hansara ábyrgd. Hvat hevur hann gjørt við tað í meir enn 3 ár? Onki! Haraftrat kan eg upplýsa, at umboð fyri Føroya Rætt upplýsti bæði landsstýrismanninum og rættarnevndini, at lat landsstýrið tinglýsingina blíva ein part av donsku fyrisitingini, fór hon at verða umsitin á sama hátt og undir somu treytum sum hin danska tinglýsingin. Tað varð enntá lagt aftrat, at vildu føroyingar, at tað skuldi verða frí atgongd til skipanina á internetinum, ja so kundi landsstýrið gjalda tað tað kostaði.

Tað hevði verið ógviliga áhugavert, um fjølmiðlarnir ikki lata landsstýrismannin sleppa við sínum sjóforkláringum, men kanna eftir um nakað hald er í hansara undanførslum:

- spyrji teir kompetentu tøkniligu stovnarnar í Føroyum - t.d. tøkniligu leiðararnar á Elektron, Matrikulstovuni, Føroya Dátusavni - um tað passar, at tað er av tøkniligum orsøkum at tinglýsingin á fjórða árið liggur avreidd í Danmark ?
- spyrji forsetan fyri Eystara landsrætt, sum landsstýrið hevur avreitt myndugleikan yvir tinglýsingini til, um tað er hansara skyld at lógin verður umsitin ólógliga ? Ringið til Præsidenten for Østre Landsret, tlf. 0045 33970200, spyrjið eftir Ziegler ella skrivaranum Finn Haargaard, um tað skal takast í álvara, so sum tinglýsingarlógin ásetir, at tað er Eystari Landsrættur sum skal syrgja fyri at tinglýsingin (herundir frí atgongd á internetinum) verður umsitin eftir lógini ? Ella um Føroya Landsstýrið hevur upplýst teimum, at hendan greinin í lógini als ikki skal takast í álvara?

# Fakfeløg mótmæla harðliga uppsøgn í Fiskimálaráðnum

TÍÐINDASKRIV

Nógv hevur í seinastuni verið frammi um trupulleikar í umsitingini í Fiskimálaráðnum, og hevur hetta elvt til krav um upprudding. Seinasta málið var ein átala frá umboðsmanninum, sum er endað við, at ein fulltrúi hevur fingið fráboðan um uppsøgn.

Uttan at fara nærri inn í smálutir í sjálvari uppsøgnini, eru undirritaðu fakfeløg av tí fatan, at grov brot eru framd á galdandi rættarreglur, sáttmála, og almenna uppsagnarpolitikkin. Undirritaðu fakfeløg meta hesi brot verða nógv grovari, enn tað seinasta málið, sum førdi til átalu frá Løgtingsins umboðsmanni.

Undirritaðu fakfeløg mótmæla harðliga, at ein einstakur fulltrúi uttan leiðsluábyrgd verður sagdur úr starvi sum avleiðing av øllum teim átalum, Fiskimálaráðið hevur fingið hesa seinnu tíðina.

**Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya**
**Magistarafelag Føroya**
**Føroya Verkfrøðingafelag**
**Starvsmannafelagið**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Fíggjarmálaráðharrin lumpar og lirkar

**Finnleif Guttesen**
*býráðslimur á Tvøroyri*



Tað er mannagongdin hjá Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra, við nýggjasta uppskotinum um "skattahækking".

Í tingmálið nr. 6/2003, sum Karsten Hansen landsstýrismaður hevur lagt fram vegna landsstýrið, er ein lygn og ein roynd at lumpa tingfólk og borgarar við.

**Lygnin**
Í viðmerkingunum stendur, at um landið lækkar landsskattin við 0,9 prosentum og kommunurnar hækka sín skatt við 0,9 prosentum, so merkir einstaki borgarin onga broyting í samlaða skattinum, men er hetta ein kolsvørt lygn.

Tí við hesum prosenthækkingum og lækkingum, verður skatturin hjá einstaka borgara, sum hevur eina inntøku uppá 150.000 krónur, 882 krónur hægri og frá einari inntøku uppá 200.000 krónur og uppeftir, verður skatturin 1332 krónur hægri, hvørt ár.

**Endurrindan lig við skattahækking**
Við kreativari hugsan hevur Fíggjarmálaráðharrin funnið uppá, at tá ið landi skal endurrinda kommununum ein inntøkumiss, so skulu kommunurnar bara hækka sítt skattaprosent, ólukksáliga smart má sigast.

Hetta ætlar Fíggjarmálaráðharrin at lumpa og lirka ígjøgnum í tinginum, við kompensatiónini av FAS-skipanini til kommunurnar.

**Kollveltandi uppfinning??**
Tá ið samgongan áleggur størri fíggjarligar byrðar ella skerjir inntøkurnar hjá kommununum, kompenserar landið nú við, at siga til kommunurnar, tit kunnu bara hækka skattaprosenti. Nýggj slóðbrótandi uppfinning av samgonguni??

Ljótari framgangsmáti skal ein so leita leingi eftir, so er tað sagt.

**Hvar er fjórða statsmaktin**
Í hesum málið, við lygnum og einari greiðari ætlan um at lumpa,- í barnaverndarmálinum har einki er klárt,- á eldraøkinum har heldur einki er klárt, bert tað at kommunurnar skulu gjalda, haldi eg, at tað er skyldan hjá fjórðu statsmaktini, at seta kritiskar spurningar til tey, sum vara av hesum málum, tí avleiðingin er eingin greiður yvir.

Livst so spyrst.

# Goebbels ella Hitler er eitt feitt

**Ingi Rasmussen**
*blaðmaður*



Jóannes Eidesgaard og Regin Eikholm hava seinastu dagarnar havt lesarabrøv í bløðunum, har teir verja Katrina Dahl Jakobsen, løgtingskvinnu, sum varð átalað av formansskapinum fyri at leggja Høgna Hoydal undir at brúka somu metodur sum nasistarnir undir 2. heimsbardaga.

Teir siga, at tað er ein heksajakt farin fram ímóti Katrin Dahl Jakobsen, tí hon hevur ongantíð nevnt Hitler. Róð verður framundir, at fjølmiðlafólk hava gjørt hesa samanberingina í eini roynd at raka Katrina.

Eg føli meg raktan. Eg gjørdi sum blaðmaður samanberingina hjá Katrin Dahl Jakobsen lidna. Rætt skal vera rætt. Katrin nevndi ongantíð Hitler. Heilt ítøkiliga segði hon: »Eg troysti mær ikki at nevna navnið á persóninum, men nakað av hesum snildunum hava okkara konservativu nationalistar eisini brúkt«. Orðini fullu á tingsins røðarapalli í sambandi við, at hon nevndi nasistarnar undir 2. heimsbardaga og helt eina mynd upp av Høgna Hoydal.

Bæði Regin Eikholm og Jóannes Eidesgaard hava ført fram, at helst var talan um Joseph Goebbels, ið var propandaministari undir Hitler, og tí var tað ikki so álvarsligt, sum Katrin Dahl Jakobsen førdi fram.

Álvaratos! Mær kann tað gera tað sama, hvør teirra tað var. Teir stóðu fyri tí sama.

Mítt endamál hevur ongantíð verið at vart ella ákært nakran. Greinarnar, sum eg havi skrivað, snúgva seg um støðið á føroyska kjakinum. Útgangsstøðið er hendan ítøkiliga hendingin. At Eidesgaard og Eikholm halda útsøgnina hava lítið upp á seg, tí talan var um Goebbels og ikki Hitler, mugu teir um, men í Føroyum mugu vit eisini hava loyvi til at viðgera slíkt journalistiskt. Eins og tey gera aðrastaðni.

Orsøkin til, at eg svari aftur, eru orðini hjá Regini Eikholm um, at tað í viðtaluni við Eyðun Andreasen, fólkalívsfrøðing á Fróðskaparsetrinum, helst er journalisturin, sum hevur lagt honum orð í munnin, tá útgangsstøði fyri samrøðuni bleiv, at Katrin Dahl Jakobsen samanbar Hoydal við Hitler.

Til tað er at siga, at Eyðun Andreasen, fólkalívsfrøðingur, sjálvur hevur sæð orðini, sum Katrin Dahl Jakobsen segði á løgtingi. Hann helt ongan iva vera um, at hon samanbar við Hitler. Tá eg so spurdi, um tað kundi vera onkur annar, t.d. Goebbels, svaraði hann: »Nei! Tí øll fata tann nasistin, sum eingin troystar sær at nevna undir seinna heimsbardaga, fyri at vera Hitler. Meinti hon við Goebbels, skuldi hon sagt tað.« Hetta kom ikki við í greinina, men Eyðun Andreasen kann sjálvur vátta hetta.

Yvirhøvur vísir hetta mál, at tú skalt ansa tær, tá tú nýtir myndir. Ikki minst, um tú samanber fólkavaldar føroyskar politikarar við nasistar. At Eikholm og Eidesgaard eftir øllum at døma halda tað vera í lagi, mugu teir so svara fyri.

Formansskapurin á Føroya løgtingi helt tað vera skeivt.

Frá Norðoya Sambandsfelag:

# Almennur fundur um eldrarøktina

**Magni Laksáfoss búskaparfrøðingur, Elsba Lützen økisleiðari fyri heimahjálpina í Norðoyggjum og Lisbet L. Petersen formaður Sambandsfloksins verða við á fundinum**

FYRILESTUR
*tíðindaskriv*

Mánakvøldið 17. november verður almennur fundur um eldrarøktina í Norðoyggjum og eldraøkið sum heild.

Á fundinum kemur Magni á Laksáfoss, búskaparfrøðingur, at umrøða eina framrokning av talinun av pensjónistum, sum m.a. vísir at eldrarøktin verður stórsta samfelagsliga og búðskaparliga avbjóðingin hjá føroyska samfelagnum komandi árini.

Elsba Lütsen, økisleiðari fyri heimahjálpina í Norðoyggjum, fer at greiða frá støðuni í Norðoyggjum í dag.

Við á fundinum verður eisini forkvinna Sambandsfloksins, Lisbeth L. Petersen og Alfred Olsen, limur í trivnaðarnevnd løgtingsins.

**Øll eru vælkomin**
Á seinasta fundi sum Norðoya Sambandsfelag skipaði fyri við evninum "Búskapurin í Norðoyggjum" vóru umboð fyri allar flokkar við á fundinum og var hetta við til at gera kjakið sera áhugavert.

Vit fara aftur hesaferð at undirstrikað at fundurin er fyri øll og serliga eru býráðs- og tinglimir og onnur sum hava áhuga fyri eldrapolitikki vælkomin á fundin.

Hvar fundurin verður er ikki avgjørt enn, men verður kunngjørt seinri.

**Kjak og vinningar**
Høvi verður eisini at kjakast og seta spurningar.

Sum áður sagt so hevur Norðoya Sambandsflokkur fingið umsókn um stuðul til nýggjan buss til bústovnin Dáan, og í hesum sambandi verður burturluting á skránni har allur peningurin fer óskerdur til keyp av nýggjum bussi.

# Alt verður betri undir Brúnni

**Heðin Mortensen**
*Formaður í mentunarnevndini*



**Viðmerking til »opna viðmerking til eina meining« í Dimmalætting 1. november 2003.**

Nøkur foreldur at børnum í býlingshúsinum í Smærugøtu, undir Brúnni, seta í grein í Dimmalætting spurnartekin við framferðarháttin hjá Tórshavnar býráð og undirritaða, tá talan er um umstøðurnar viðvíkjandi dagsstovninum undir Brúnni í sambandi við byggingina av Berjabrekku 3.

Í fyrsta lagi er tað harmiligt, at hesi góðu foreldur kenna seg noydd at vera dulnevnd, tí tað kundi verið stak áhugavert at fingið orð á tey og sloppið at greitt teimum frá, hvat alt hetta málið í veruleikanum snýr seg um.

Eftir øllum at døma hevur kunningin ikki verið nøktandi, og tað harmist eg almikið um. Ikki minst, tí veruleikin um alt hetta málið er alt annað enn ein sorgarleikur ella eitt afturstig, soleiðis sum tað dúgliga verður gjørt til.

Tvørturímóti eru ætlanirnar fyri alt økið endurskoðaðar, so tær koma øllum pørtum til góðar. Eitt nú kann eg nevna, at sett er av eitt fríøki upp á yvir 2.000 fermetrar beint við dagsstovnin, sum er frítt at brúka. Hetta eru nógv betri umstøður, enn talan var um frammanundan.

Somuleiðis ber nú til at fáa spælihúsið nærri sjálvum dagsstovninum, so tað í allar mátar verður høgligari og betri hjá bæði børnum og starvsfólkum. Haraftrat fáa vit tryggja, at hetta spælihús í framtíðini verður brúkt til tað, tað er ætlað til. Hetta hevur tíverri ikki verið so frammanundan.

Samanumtikið kann staðfestast, at verandi samgonga í býráðnum hevur, meiri enn nøkur undan henni, skapt góðar og tryggar umstøður hjá børnunum. Ikki minst við at tora at taka stigið og føra út í verkið karmar fyri barnaansingina í Tórshavnar kommunu, so barnaansingartørvurin í august komandi ár er nøktaður 100 prosent!

Umframt teir fýra nýggju ansingarstovnarnar, sum eru bygdir í hesi setuni, koma fimm nýggir aftrat komandi ár. So her ber ikki til at siga, at vit í býráðnum ikki virða børnini. Tvørturímóti er staðfesti veruleikin, at vit hava fingið níggju nýggjar stovnar við góðum og tryggum umhvørvi fyri børn, starvsfólk og foreldur.

Eftir stendur kortini, at eg harmist um, at hesi góðu foreldur, ið kendu seg noydd at tríva í pennin og seta greinina »Ein opin viðmerking til eina meining« í Dimmalætting, ikki heldur valdu seg seta seg í samband við okkum, ið umsita og útinna tær uppgávur, brúk er fyri at fáa loystar í kommununi.

Tað hevur ikki so nógv upp á seg at taka hornið av telefonini og biðja um eitt prát um viðurskiftini á staðnum, so at høvið er at greiða frá teimum framtíðarætlanum, ið eru fyri stovnin.

Skuldi áhugi verið fyri tí, eri eg í øllum førum til reiðar at koma á staðið at greiða frá og hoyra tykkara sjónarmið.